## Edmilson liðugur

Brasiliski miðvallarin Edmilson hevur fingið boð um, at hann ikki kann taka lut í HM-endaspælinum. 29 ára gamli spælarin fekk ein knæskaða undir venjing mánadagin, og hesin hevur víst seg somikið álvarsligur, at tað er ikki hugsingur um at spæla í Týsklandi. Ístaðin fyri Edmilson er Sao Paulo spælarin Mineiro tikin í hópin.

**-mørk**

## Oddsini frá Dansk Tipstjeneste

***Hvør kemur víðari úr bólki C***

| | |
|---|---|
| Argentina & Holland | 1,75 |
| Argentina & Serbia&Montenegro | 4,50 |
| Argentina & Fílabeinsstrondin | 4,50 |
| Holland & Serbia&Montenegro | 7,50 |
| Holland & Fílabeinsstrondin | 7,50 |
| Serbia&Montenegro & Fílabeinsstrondin | 20,00 |

## Bólkur C

### ARGENTINA

**Málverjar**
Roberto Abbondanzieri
Leo Franco
Oscar Ustari

**Verja**
Roberto Ayala
Juan Pablo Sorin
Favricio Coloccini
Gabriel Heintze
Gabriel Milito
Leandro Cufre
Nicloás Burdisso

**Miðvøllur**
Esteban Cambiasso
Javier Mascherano
Juan Riquelme
Lionel Scaloni
Pablo Aimar
Maxi Rodríguez
Lionel Messi
Lucho Gonzalez

**Álop**
Carlos Tevez
Rodrigo Palacio
Javier Saviola
Hernán Crespo
Julio Cruz

### FÍLABEINS-STRONDIN

**Málverjar**
Jean-Jaques Tizie
Gerard Gnanhouan
Boubacar Barry

**Verja**
Arthur Boka
Blaise Kouassi
Marc Zoro
Cyril Domoraud
Emmanuel Eboue

**Miðvøllur**
Kolo Toure
Didier Zokora
Emerse Fae
Bonaventure Kalou
Gilles Yapi Yapo
Adboulaye Meite
Gneri Yaya Toure
Guy Demel
Ndri Romaric

**Álop**
Kanqa Akale
Arouna Kone
Didier Drogba
Bakari Kone
Aruna Dindane
Abdulkader Keita

### HOLLAND

**Málverjar**
Edwin Van der Sar
Henk Timmer
Maarten Stekelenburg

**Verja**
Kew Jaliens
Khalid Boulahrouz
Joris Mathijsen
Andre Ooijer
Johnny Heitinga Tim De Cler

**Miðvøllur**
Giovanni Van Bronckhorst
Denny Landzaat
Philip Cocu
Rafael Van der Vart
Jan Kromkamp
Hedwiges Maduro
Mark Van Bommel
Wesley Sneijder

**Álop**
Dirk Kuijt
Duud Van Nistelrooy
Arjen Robben
Robin Van Persie
Jan Vennegoor of Hesselink
Ryan Babel

### SERBIA & MONTENEGRO

**Málverjar**
Dragoslav Jevric
Oliver Kovacevic
Vladimir Stojkovic

**Verja**
Ivica Dragutinovic
Nemenja Vidic
Goran Gavrancis
Dusan Basta
Nenad Djordjevic
Milan Dudic
Dusan Petkovic
Mladen Krstajic

**Miðvøllur**
Igor Duljaj
Ognjen Koroman
Mateja Kezman
Dejan Stankovic
Predrag Djordjevic
Albert Nadj
Zvonimir Vukic
Sasa Ilic

**Álop**
Ivan Ergic
Savo Milosevic
Nikola Zigic
Danijel Ljuboja

# Tann nýggi Maradona

**Hálovandi orðini eru tíðum heft á nýggj argentinsk stórtalent. Men sjáldan hava vónirnar verið somikið stórar, sum tær hava verið tað viðvíkjandi lítla Lionel Messi**

ARGENTINA

*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Sum bara 19 ára gamal hevur Messi í ár sligið sítt navn fast við sjey-tumma seymi. Á Champions-League vinnandi liðnum hjá Barcelona hevur lítli offensiv-spælarin havt ein lyklaleiklut. Og hóast liðið eisini telur menn sum Eto'o og Ronaldinho, so snúi at kalla øll upptaktin til finaluna móti Arsenal seg um, hvørt lítli gandakallurin skuldi verða tøkur til finaluna.

Tað gjørdist Messi ikki, men hetta kann tó bert vera viðvirkandi til at økja motivatión hansara, nú Argentina enn einaferð skal royna seg í einum HM-endaspæli.

Og hóast unga aldurin, so er longu nú nógv, sum bendir á, at unglingin er førur fyri at taka ábyrgdina á seg.

Sálarliga styrkin er óvanlig hjá einum somikið ungum spælara, og ikki eingongd Mourinho-glosurnar um sjónleik eftir fjórðingsfinaluna móti Chelsea tóktust á nakran hátta at nerta unga argentinan.

Skjóta sálarliga búningin hevur kanska eisini sína frágreiðing. At Messi er klaktur á talent-deplinum hjá Barcelona hevur nevnliga sínar heilt serligu orsøkir. Sum smádrongur var Messi álvarsliga sjúkur av eini sjáldsamari vakstrarlagssjúku. Læknaliga støðið í Europa er í flestu mátar hægri, enn tað er í Suðuramerika, og tí gjørdu foreldur hansara av at flyta til Spania, soleiðis at sonurin kundi fáa bestu hugsandi viðgerðina.

Hóast evnini við bóltinum vóru framúr, so ivaðust summar fótbóltsskótar í, hvørt lítli kroppurin kundi taka trýstið, sum fylgir við yrkisfótbóltinum, men í Barcelona vóru tey tó til reiðar at taka kjansin. Og tað munnu tey ongantíð hava angra.

Liðið hevði tá longu Saviola og Riquelme í hópinum, men hvørgin teirra megnaði av álvara at sláa ígjøgnum. Men fyri fótbóltsevnini hjá Messi var hetta tó eingin forðing. Longu eftir fyrsta dystin taldist hann millum favorittarnar hjá áskoðarunum, og síðani hevur kósin verið sett beint móti toppinum.

Higartil hevur talan verið um HM-heitið fyri U-20 landslið, spanska meistaraheitið og Champions League. Í summar er møguleikin fyri tí heilt stóra steypinum til staðar. Røkkur hann eisini hesum, kann Lionel Messi av sonnum sammeta seg við størsta spælaran, sum Argentina nakrantíð hevur fostrað.



*Lága tyngdarpunktið, snarandi driblingarnar og eksplosivi rykkini. Hóast nakað tynri á at líta, kann Lionel Messi longu nú á fleiri økjum sammetast við él Diego*

Mynd: Scanpix